

## Aftankvirra í Vágs kirkju

Aftankvirra verður í Vágs kirkju fríggjakvøldið 3. apríl við andakt og tónleiki. Kirkjan letur upp klokkan 21, og kvirra er til klokkan 22, tá solistar og tónleikarar fara at framføra. Solistar eru Jonhild A. Nielsen, Sunrid Kærbech, Brandur og Ingi, Solgerd Thomsen, Hans jacob Hjelm. Endað verður við andakt við Finni Johannesen. Aftaná eru øll vælkomin til kaffi og køkubita á kirkjuloftinum.

# Fólksliga bókasavnið

**Býarbókasavnið fyllir í dag 40 ár. Gjøgnum árini er Býarbókasavnið vaksið úr 514 fermetrum upp í 810, úrvalið er ment til eisini at fevna um tíðarrit, ljóðbøkur og dvd filmar, og er talið av bókum vaksið úr 17.700 til 74.500 hesi árini. - Býarbókasavnið skal vera fólksligt, sigur Anna Brimnes, sum hevur verið bókavørður síðan 1975**




FØÐINGARDAGUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Stórur dagur er í Býarbókasavninum í dag. Býarbókasavnið kann nevniliga hátíðarhalda síni fyrstu 40 ár, sum hava havt við sær umfatandi broytingar síðan upplatingina 1. apríl 1969. Anna Brimnes er bókavørður á Býarbókasavninum, har hon hevur starvast síðan 1975, og hevur arbeitt undir skiftandi viðurskiftunum á bókasavninum.

– Tá eg byrjaði her, átti bókasavnið 17.700 bøkur. Í dag er talið 74.500. Síðan eg byrjaði her, er úrvalið hjá okkum víðkað til ljóðbøkur, dvd filmar og tíðarrit, umfram bøkurnar sjálvar, sigur Anna Brimnes, bókavørður.

Hølini hjá Býarbókasavninum eru eisini farin gjøgnum broytingar hesi 40 árini.

– Frá byrjan var støddin á Býarbókasavninum 514 fermetrar, og húsaðist bókasavnið á 2. og 3. hædd. Í 1990 fingu vit 4. hædd afturat, og í 1993 varð tekniska deild hjá Tórshavnar kommunu løgd afturat bókasavninum, og tað gjørdi veruliga mun hjá okkum. Í dag hava vit 813 fermetrar á fýra hæddum at breiða okkum út á, sigur Anna Brimnes.

### Kollveltandi teldur

Nakað annað, ið hevur munað arbeiðið hjá Býarbókasavninum, er tøkniliga menningin.

– Tað merktist ein ótrúligur munur, tá teldurnar komu á bókasavnið í 1998, og fólk harvið fingu atgongd til internetið. Fólk fóru at nýta bókasavnið á ein øðrvísi hátt, og komu meir inn á bókasavnið, sigur Anna Brimnes.

Í dag kunnu fólk bíleggja sær bøkur umvegis heimasíðuna hjá Býarbókasavninum, og er ein óhjálpin, ber til at fáa bøkurnar til dyrnar við Bókaberanum eina ferð um mánaðin.

Býarbókasavnið hevur altíð lagt seg eftir at eiga inni nýggjastu bøkurnar, og keypir eitt lítið úrval av útlendskum tilfari til bókasavnið. Dvd filmarnir, ið fylla nógv á hillunum í Býarbókasavninum, eru allir góðskufilmar, leggur Anna Brimnes dent á.

– Tað var í 2004 at vit byrjaðu at læna út dvd filmar, og teir verða nógv læntir. Tað, sum eg nú kundi hugsað mær at útbygt bókasavnið við, er tónleikur. Í øðrum bókasøvnum er tað vanligt at mann hevur fløgur við tónleiki at læna út eisini, sigur Anna Brimnes.

Sum er, eru ikki umstøður til at útbyggja úrvalið við tónleiki. Til tað er plássið ikki nóg mikið. Í tveimum umførum hava ætlanir verið frammi um at byggja nýtt bókasavn í Havn, men í báðum førum eru ætlanirnar sleptar. Kortini er bókavørðurin varðin við at gremja seg um hølisviðurskiftini, sum kundu verið betri.

– Tórshavnar kommuna hevur altíð hjálpt bókasavninum væl. Serliga viðvíkjandi tí tøkniliga, hava vit ongantíð manglað nakað, og allar skipanir eru av nýggjasta slag, sigur hon.

### Býarbókasavnið á Facebook

Eitt gott dømi um hvar Býarbókasavnið er í dag, er at vísa á Facebook profilin hjá Býarbókasavninum. Harafturat hevur bókasavnið eina heimasíðu, sum javnan verður dagførd við styttri ummælum av bókum, og nýggjum tíðindum.

So hvørt sum internetið hevur vunnið seg fram seinastu árini, hava spádómar verið frammi um at bøkurnar fara at missa sína makt. At tað ikki framyvir skal vera neyðugt at fara í bókasavnið ella bókhandilin at læna ella keypa sær eina